# Jarðfeingi um Tornado: Sera gott fyri okkum

**– Hetta sær ikki so galið út. Tað er av fínasta slag**

OLJUFUND
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

So fegin og positivur er stjórin yvir øllum stjórum, tá tað snýr seg um føroyska oljuleiting, Petur Joensen á Jarðfeingi, tá vit spyrja hann um seinasta fundið við markið.

Málið hann sipar til er seinasta oljufundið beint við markið. Eitt samtak av oljufeløgum, OMV, Dana Petroleum, Faroe Petroleum, Dong og Idemitsu boðaði í vikuni frá, at tey høvdu gjørt eitt fund einans tríggjar fjórðingar frá føroyska markinum, á leitimiðinum Tornado.

Hóast stjórin á Jarðfeingi hevði verið enn meira fegin, um talan var um eitt fund á føroyskum øki, so metir hann slíkt fund so tætt við av alstórum týdningi fyri okkum. Hetta vísir á, at hetta seinasta fundið er bara enn ein staðfesting av, at olja er her nærhendis, og tað gevur so aftur oljufeløgunum meira trúgv uppá Føroyaøkið.



*Petur Joenssen, stjóri á Jarðfeingi: -Tornadofundið gott fyri okkum uppá nógvar mátar*

Tá tíðindini komu út um fundið í Hetlandi ringdi BBC til Jarðfeingi og spurdi, um føroyingar ikki vóru ævinsjúkir, at øll fundini, sum gjørd verða, liggja skeivu megin markið!

– Eg svaraði, at tað er ikki spurningurin í løtuni, um tað eru teir ella vit, sum finna oljuna. Tað, sum umrøður, er at skapa áhuga millum oljufeløgini fyri at koma henda vegin.

Petur Joensen, sum fylgir gongdini eystan fyri markið sera neyvt, vísir á, at tað skilst, at olja er funnin uppaftur nærri markinum enn Tornadofundið. Talan er um Cambokelduna, sum liggur eitt sindur longur norðari. Hon sigst at vera einans hálvan annan fjórðing frá markinum.

Petur Joensen heldur sjálvur, at Tornadofundið fyrst og fremst hevur ein psykologiskan týdning fyri okkara øki. Og so er tað sjálvandi eisini gott fyri fleiri av feløgunum, sum eisini eru virkin á okkara landgrunni. Tað ger tað meira hugaligt hjá teimum eisini, tí tað gevur ábendingar um, hvat helst eisini fyri føroysku megin markið.

Jarðfeingistjórin sigur víðari, at verður hetta seinasta fundið loksins eisini grundarlag undir eini útbygging og harvið menning av infrakervinum í økinum, so fer tað við tíðini eisini at gagna framtíðar virkseminum á Føroyaleiðini.

Samanumtikið eru fleiri av hendingunum eystan fyri markið í eina tíð góð marknaðarføring av føroyska landgrunninum eisini.

Á Jarðfeingi hava tey tí eitt sera vakið eygað við gongdini í bretskum øki, um somu tíð sum tey fyrireika seg til ta kanska mest áhugaverdu boringina á landgrunninum nakrantíð, nevniliga Anne Marie brunnin, har sett verður á um minni enn eitt hálvt ár.




*Cambobrunnurin, sum vit hava hoyrt lítið um, tí hann er "tight", er bert hálvan annan fjórðing frá markinum. Onkur kort siga, at hann gongur kloss upp at markinum. Pílurin eystan fyri markið vísir, hvar Tornadofundið er gjørt. Og pílurin vestan fyri markið vísir, hvar Anne Marie brunnurin verður boraður. Millum Anne Marie leiðina og Cambo eru bert 15 fjórðingar*

# Gongdin hevur givið honum høgan aldur

**Millum tey mongu, sum vóru til tað serliga háskúlatiltakið í Føgrulíð á Borðoynni tann í summar, var klaksvíkingurin John Lassen, sum hóast síni 92 ár helt á fjøllini - báðar vegir**

FÓLK OG NÁTTÚRA
*Jan Müller/Árni Joensen*
*jan@ras2.fo*
*arni@sosialurin.fo*

Tað er ikki hvørjum manni beskorið, at røkka teimum 92 árunum, og uppaftur færri eru teir ella fyri tann skuld tey, sum við so mongum árum á baki orka ella hætta sær á fjøllini. Men klaksvíkingurin John Lassen setist ikki aftur ella sendir ikki avboð, sjálvt um hansara luttøka krevur, at hann fer upp niðan onkra líðina og upp um okkurt skarðið. Tí gjørdi hann heldur ikki nógv burtur úr sær, tá Rás2 hitti hann í Føgrulíð til háskúlatiltakið har í summar.

Hetta var ikki fyrstu ferð, at John Lassen ella John hjá Amerikanaranum, sum hann eisini verður róptur, var í Føgrulíð. Sum smádreingir plagdu hann og javnaldrarnir í Klaksvík at fara hagar, og nú hann er farin um tey níti, var tað framvegis hugurin at ganga, sum fekk hann at gera ferðina eina ferð afturat í summar.

– Ja, tað var mest fyri at sleppa at ganga higar, segði hann við Rás2, og satt at siga hevði hann lættari at draga andan enn blaðmaðurin, sum helt mikrofonini og myndatólinum. Men John hevur eisini kondisjón, sum tað nú eitur. Hann var fjallmaður í mong ár, og sum 80 ára gamal hevði hann ta ovastu ódnina á fjalli í Árnafirði. Og hann gongur enn.

– Eg og hundurin ganga ein fjórðing um dagin og njóta náttúruna, sigur hann og leggur afturat, at gonguhugurin man vera ein stór orsøk til, at hann hevur rokkið so høgum aldri.

## Styðjaði Háskúlan

Tað var tó ikki bara gongutúrurin, sum fekk John Lassen at fara í Føgrulíð hendan dagin. Sjálvur gekk hann á Føroya Fólkaháskúla í Havn veturin 1936-37. Hví hann fór?

– Eg haldi, at tað var mest fyri at halda Háskúlan gangandi. Tað var so lítið av fólki ella í hvussu er dreingjum á skúlanum í tríatiárunum, sum vóru so ring, sigur John Lassen.

Sjálvur ivast hann ikki í, at Háskúlin hevur havt stóran týdning og serliga fyri málið. Men í dag er verri, sigur hann, tí í fjølmiðlunum er alkt vorðið enskt, sjálvt tað, sum sungið verður.

